# TAÐ HENDIR ...

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



## SEBASTIAN HEIÐRAÐUR

Danski sangskrivarin Sebastian rundar beint fyri jól 60 ár, og í tí sambandi er ein serlig fløga komin út í Danmark. Á fløguni tulka yngri danskir tónleikarar sangir hjá Sebastian til heiðurs fyri stóra tónaskaldið. Millum tey, sum syngja á fløguni, eru Sys Bjerre, Tue West, Randi Laubek, Aura og Rasmus Nøhr.

**YMISK**
En Hyldest Til Sebastian
fløga



## SÁLMAR Á KLAVERI

Jóannes Símunarson Hansen kemur í næstum út við eini fløgu, har Jóannes spælir nýggjari og eldri sálmar á klaver. Í tí sambandi verður skipa fyri eini útgávukonsert og sangkvøldið í Løkshøll fríggjakvøldið. Jóannes fer eisini at spæla løg frá útgávuni hjá sær.

**LØKSHØLL Í RUNAVÍK**
Fríggjakvøldið 20/10 kl. 21.00



## DRAMA Í VATIKANINUM

Professarin Robert Langdon kemur á slóðina av einum duldarfullum felagsskapi, sum gera alt fyri at røkka sínum máli. Og fíggindin hjá felagsskapinum er katólska kirkjan. Tom Hanks í leiklutinum sum Langdon jagstrar slóðir í Vatikaninum og í Rom, og spenningurin er stórur. Nú er søgan hjá Dan Brown, sum var eitt hitt í biohøllunum, komin á dvd og kann stytta um eitt av teimum myrku kvøldunum fyri framman.

**ANGELS & DEMONS**
Dvd-filmur

## NESBØ Í STÓRFORMI




Tvær kvinnur verða funnar dripnar í Oslo, druknaðar í egnum blóði og við løgnum stikksárum í munninum. Løgreglan fer at leita eftir løgreglumaninum Harry Hole, sum er rýmdur av landinum, fyri at fáa hann at loysa trupla málið. Hetta er enn ein bók í røðini um Harry Hole, og Jo Nesbø er í stórformi. Ummælini av bókini hava verið sera góð.

**JO NESBØ**
Panserhjerte
Aschehoug

## SAVNA PENGAR

Leygarkvøldið verður stóra landsinnsavningin til frama fyri stríðið ímóti krabbameini. Sjónvarpið sendir beinleiðis frá tiltakinum, har tað ræður um at skaffa so nógvar pengar sum gjørligt. Føroyar móti krabba

**SJÓNVARP FØROYA**
Leygarkvøldið 31/10 kl. 19.00



## HØGNI Á TÓNLEIKAFERÐ

Fríggjakvøldið fer Høgni Lisberg á ferð gjøgnum tónleikin, sum hevur givið honum íblástur gjøgnum tíðina og vakt hansara áhuga at smíða egin løg og skriva egnar tekstir. Konsertin verður gomlu hølunum í í Leikalund í Klaksvík, ið hóska sera væl til akustiskan tónleik

**LEIKALUND Í KLAKSVÍK**
Fríggjakvøldið 30/10 kl 20.00




## FÓTBÓLTS-KONGURIN

Franski fótbóltsspælarin Eric Cantona hevur eina heilt serliga søgu, men hann ætlar sær ongantíð at skriva sína ævisøgu. Philippe Auclair hevur nú skrivað eina bók um uppreistrarmannin, sum gjørdist kongur í Manchester United. Auclair hevur tosað við øll týðandi fólk í lívinum hjá Cantona og sigur eina nærgangandi søgu um umstrídda og gávaða fótbóltsspælaran.

**PHILIPPE AUCLAIR**
Cantona: The Rebel Who Would Be King
Macmillan

## DREYMAVITJAN

Føroyski rockbólkurin The Dreams hittar nú aftur í Danmark, eftir at teir hava givið nýggjan sang út. Under The Sun kallast sangurin, sum skal verða við til at føra The Dreams longur út í heim. Leygarkvøldið kann The Dreams upplivast til tiltakið Crazy Nights, sum verður hildið í ítróttarhøllini á Kambsdali.

**CRAZY NIGHT**
Ítróttarhøllin á Kambsdali
Leygakvøldið 31/10

